


# Kirkjugarður

*á Svínaryggi*

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



# Johan í Horni gjørdist offur fyri sponsku sjúku

**Tey í Horni eru ein kend ætt í Havn. Eisini eru tey kend fyri at blíva ógvuliga gomul. Men Johan hjá Dánjal í Horni gjørdist bert 27 ár**

Johan var sonur Elspu og Dánjal í Horni í Havn. Hóast hann doyði so ungur kann nakað greiðast frá honum. Í skiftinum hjá honum finst nakað. Hann hevur verið maskinmeistari eins og pápi, og hann var »værnepligtig« hjá »Søværnets Kaserne«, tá ið hann doyði. Her hevði hann eisini bústað. Johan fekk influensa, sponsku sjúku, og hann varð innlagdur á »Det for Hær og Flaaden fælles Epidemihospital.« Johan var bert sjúkur í 10 dagar, táið hann doyði. Hetta hevur gingið so skjótt, at ættin heima visti einki fyrr enn deyðsboðini komu.

Tað varð gjørt upp eftir hann í Danmark. Endiliga uppgerðin vísti, at Johan átti til góðar kr. 256,53, sum var fitt av peningi tá í tíðini. Hetta var saman við einum kufferti við hansara ognarlutum sent til Føroyar. Johan hevur eisini verið framskygdur á annan hátt. Hann hevði nevniliga teknað ein lívstrygging, sum nú gav kr. 2.000. Hetta var ein heilt stór upphædd tá.

Pápin reisti spurningin, um sonurin kundi eiga part av bjargingarløn í samband við eini bjarging hjá Beskytteren, sum var eitt kent sjóverjuskip við Føroyar. Hesum skipi hevur Johan so siglt við. Dánjal visti um onkran annan av manningini, sum hevði fingið bjargingarløn. Men tað varð greitt frá, at Johan hevði fingið hendan pening útgoldnan umborð. Johan hevði eisini siglt við krússaranum Heimdal. Tað var vist hetta skip hann nú sigldi við.



*Foreldrini hjá Johan vóru Elspa og Dánjal í Horni í Havn*

## Bragdligur unglingi

Andlátið av Johan varð eisini umrøtt í bløðunum. Dimmalætting skrivar 30. oktober:

»Í gjárkvøldið fekk maskinmeistari Daniel Samuelsen (Dánjal í Horni) her í býnum tey sorgarboð, at sonur hansara Johan Samuelsen er deyður i Keypmannahavn av influenza. Hetta kom heilt óvæntandi, tí ikki var áður frætt nakað um, at Johan var vorðin sjúkur.

Tað er jó soleiðis í hesi tíð, at deyðin dagliga hevur boð eftir mongum ungum manni, og í heimum víða hvar sita syrgjandi mammur og pápar. Vit hoyra og lesa dagliga um deyðans verk, og vit hugsa um tey sorgarbundnu víða hvar um heimin, men tað vil so vera, at sorgin fyrst kenst dupult tung og nívandi, tá tað eru eins nærmastu, deyðin kallar heim. (Hetta var undir fyrra heimsbardaga.)

Johan í Hodni er deyður – langt burturi frá Føroyum og barnaheiminum, ið áttu allan hansara kærleika. Og hjá okkum, ið frá barnaárunum kendu hann og síðan komu saman við hann bæði her í Føroyum og aðrastaðni, vil tað kennast sum ein stórur saknur, at vit aldri skulu síggja hann aftur, tann lívsglaða og dámliga unglingin.

Johan í Hodni var ein evnaríkur og rættsinnaður ungur maður. Hann hevur verið Føroyum til æru, hvar hann hevur ferðast.«

**Tingakrossur skrivar:**

»Í gjárkvøldið bórust tey sorgartíðindi higar til landið, at Johan Samuelsen, sonur Dánjal í Horni, var deyður í Keypmannahavn av influensa (spanskari sjúku.)

Í vónríkastu ungdómsárum er Johan tikin burtur úr lívinum, sum tyktist at liggja ljóst og fagurt fyri honum. Hann verður syrgdur av øllum, ið kendu tann vinsæla, vakra og vituga unglingin.«

Tað sæst annars í HB-bókini hjá Jógvan Arge, at Johan hevur verið virkin í fótbólti. Hann var sum eykamaður við einum felagsliði av HB, Miðvágs Bóltfelag og TB á eini fótbóltsferð til Noregs í 1910.

## Deyðslýsing 30. oktober 1918

Det meddeles herved Slægt og Venner, at vor elskede Søn
Maskinist Johan Pauli Samuelsen
er død i København den 28 ds. af Influenza.
Paa hans dybtsørgende Søskendes og egne Vegne
Elsebeth og Daniel Samuelsen.

## Takkarlýsing 9. november 1918

Til alle dem, der har vist os Deltagelse i anledning af vor kære Søns Død og Begravelse, bringer vi herved vores dybfølte tak. En hjertelig tak til Provst Dahl. En særlig tak til kaptajn Lorch samt Officerer og Menige paa Stationsskibet.

**Elsebeth og Daniel Samuelsen**

Johan hevur eisini verið virdur av sínum starvsfeløgum. Skipið, hann sigldi við, kom á Havnina við líkinum. Tað er hetta, sum liggur aftanfyri endan á hesi tøkkini.

Børnini hjá Hannis í Horni, beiggja Johan, minnast framvegis til hvussu dygt deyðin hjá Johan serliga tók ommuni nógv ár aftaná.

## Spanska sjúkan

Spanska sjúkan, sum Johan doyði av, gjørdi eisini um seg í Føroyum. Tann 9. november 1918 er ein vegleiðing frá Færøernes Lægeforening í Dimmalætting, um hvussu fólk skuldi bera seg at fyri at forða fyri smittuni. Sjúkan smittaði gjøgnum munnin. Tí skuldi spýtt sóttreinast, og ein skuldi vara seg fyri, at sjúklingur hosta, njósa ella tosa beinleiðis móti einum. Tey sum ansa einum sjúkum, skuldu verða vard við serligum klæðum.

Tey sjúku skuldu fara beinleiðis í song fyri ikki at smitta onnur.



*Johan Pauli Samuelsen gjørdist bert 27 ár*

## Fyrstu føroyingar við Smirli

Elspa, mamma Johan, átti tveir beiggjar, Jóan Magnus og Jóhannes. Johannes var motorpassari og doyði av roykeitran umborð á Surprice hjá Restorff. Johannes var giftur við Angeliku, sum sat einkja í 60 ár sum umrøtt í røðini Hendur ið Sleptu. Ein sonur teirra var Palli Henriksen, kendur politikkari í Havn.

Fyrsta skip, Dánjal sigldi við, var hjá Østrøm og kallaðist Enigheden. Tað sigldi uppá Leith í Skotlandi. Hetta var eitt dampskip, og Dánjal byrjaði sum fýrbøtari. Dánjal kom at vera maskinmaður restina av síni tíð, hóast hann ikki hevði útbúgving. Tí mátti hann hava undantaksloyvi hvørt ár.

Dánjal var eisini við hvalabátum og við Isafold hjá Skipafelagnum. Dánjal sigldi uppá England og Týskland og aðra staðni.

Hann kom umborð á Smiril í 1898 saman við Niklas í Køk. Smiril kom til Føroyar í 1895. Øll manningin var tá donsk. Teir báðir vórðu fyrstu føroyingar við Smirli.

Fyrst í 1900 byrjar bollafabrikkin hjá Jacob Lützen, og tá kemur Dánjal at arbeiða har.

Dánjal var fyrst og fremt kendur sum maskinmeistari á Ruth hjá Mjólkaforsýningini. Her sigldi hann við í nógv ár.



*JOHAN PAULI SAMUELSEN*
*F. 11. JUNI 1891*
*D. 28.OKTOBER 1918*
*HØJT ELSKET*
*DYBT SAVNET*

## Systkini

Systkini hjá Johan vóru: Albert, umrøddur í Miðvikuni. Edvard, sum hevði spinnarí saman við Johan Evensen. Bernhard giftist til Fuglafjarðar. Hann datt oman og doyði. Alex, Karl og Johannes búðu í Havn. Albert kallaði beiggjan upp. Hetta er Johan Norðfoss, eisini kendur frá Miðvikuni

Tað var ein systir, Magnhild, sum giftist við Gøtu-Jens (Simonsen.) Hann var eisini kendur sum Bomm-Jens, tí hann hevði bommvirki.



*Johan spældi við HB. Hetta er fyrsta mynd, sum er tikin av kampliðnum hjá HB.*
**Aftast frá vinstru:** *Emil Rein, Johannes Simonsen, Valdemar Rein, Johan Samuelsen og Theodor Nielsen.*
**Miðjan:** *Poul Niclasen, Axel Mouritsen og Wenningsted Mortensen*
**Fremst:** *Jens L. Hansen í Funningsstovu, Johan Danielsen og Hans Debes*

**Komandi partur**
Í komandi parti frætta vit um Jettu og Jacob Lützen, kendur handilsmaður í Havn